# Vit leita eftir tarum og kanna fjøruna

## Kyrrupláss ella brimbard hella ?

Tarar eru frumverur Protista. Tað merkir at teirra bygnaður er ógvuliga einfaldur og ikki býttur sundur í ymiskar vevnaðir sum rót, bløð, legg og blómur. Tarar eru tó fleirkyknaðar lívverur og ofta rættiliga eyðsýndar lívverur í fjøruni. Ólivnu umstøðurnar tarar skulu tola eru ógvuliga broytiligar tí fjøran viðhvørt er undir í sjógvi og aðrar tíðir er turrari. Tí vaksa tarar ofta í beltum alt ftir hvussu væl teir tola at vera undir í sjógvi ella turrir. Tað ber væl til at siga rættiliga nógv um ólivnu umstøðurnar í einuari fjøru bert við at hyggja eftir tarunum. Festi hjá tarunum er t.d. øgiliga ymisk, og tað eru summir tarar sum bert festa seg á brimplássum meðan aðrir eru í mongd á kyrruplássum.

## At gera

Tit fara í 4 bólkar.

Tit fara at savna tara inn á hvør sínum fjørustrekki

Fyri hvønn tara tit finna, skulu tit taka eina mynd og savna ein tara inn til eyðmerking

Tit skulu harumframt royna at býta fjøruna upp í belti og lýsa, hvar ymsu tarasløgini vaksa

Roynið eisini og lýsi umstøðurnar á tykkara fjørustrekki. Er tað sandur, hella ella eitt sindur av hvørjum.

Hvar eru grøntararnir ? Hvar eru brúntararnir ? og hvar eru reyðtararnir ?